# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Mini komin sum Clubman

**Síðan nýggi Mini kom á marknaðin, hevur hann verið sera væl móttikin og fæst nú í nógvum ymiskum útgávum. Skjótt fer eisini at bera til at ogna sær stationcar útgávuna Mini Clubman**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tann vælumtóki Mini, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1959 sum Austin og Morris, og var ein sonn kollvelting innan bildesign tá, var vaktur aftur til lívs fyri nøkrum árum síðan sum ein heilt nýggjur nútímans bilur, sum nú eisini kemur í eini størri Clubman útgávu.

Clubman var annars ein vanligur Mini við annarleiðis designi framman og innan og størri motori og fekst eisini í stationcarútgávuni, ið nevndist Mini Clubman Estate.

Annars vóru stationcar útgávurnar nevndar Austin Mini Countryman og Morris Mini Traveller, sum vóru gjørdir frá 1960 til 1982.

Mini Clubman er 24 cm longri enn vanliga útgávan, og aksilfrástøðan er vaksin við 8 cm. Bilurin er eisini munandi meira praktiskur enn vanligi mini, serliga tí hann hevur tvær síðuhurðar afturat og síðuhongdar hurðar aftan.

Viðførisrúmið aftan fyri baksetrini er 260 litrar, meðan tað kann økjast til 960 litrar við at leggja baksetrini fram. Annar er baksetrið deilt 50/50, so har eru fleiri møguleikar.

Í fyrstu atløgu fæst Mini Clubman í trimum variantum: Cooper S Clubman við 175 hk, Cooper Clubman við 120 hk og Cooper D Clubman (diesel) við110 hk. Allar útgávurnar hava 6-trins manuellan girkassa sum standard, men bensinútgávurnar eisini fáast við 6-trins automatgirkassa.

Mini Clubman hevur heimspremieru á Frankfurt Motor Show, sum er í hesum døgum.




*Mini Clubman er 24 cm longri enn vanliga útgávan. Hurðarnar eru stórar, og eingin stólpi er millum síðuhurðarnar*

*Mini Clubman hevur heimspremieru á Frankfurt Motor Show*




*Clubman er stationcar útgávan av Mini*




*Mini Clubmann frá 70-unum*



*Morris Mini vøruvognur frá 60-unum*



*Innan er sami retro stílurin sum í vanliga Mini*

*BMC (British Motor Corporation). Verksmiðjan sum gjørdi Austin og Morris Mini fyrstu árini*